## Gongst illa

Fyri trimum vikum síðani kunngjørdi danska fyritøkan Vestfrost, at framleiðslan gav so mikið stórt hall, at leiðslan hevði gjørt av at flyta meginpartin av virkseminum av landinum. Nú hevur fyritøkan so kunngjørt roknskapartølini. Tey vísa, at Vestfrost seldi fyri meiri enn eina mia. krónur í fjør, men at fyritøkan hevði góðar 75 mió. krónur í halli. Tí er einki at gera uttan at flyta framleiðsluna av landinum, har lønin er lægri, sigur leiðslan.

## Sjódjór doyði

Fyri nøkrum vikum síðani fingu japanskir granskarar eitt higartil ókent sjódjór á 1200 metra dýpi. Granskararnir halda, at djórið hevur livað á størri dýpi enn so, men at tað av einari ella aðrari orsøk er komið upp á grynnri vatn nú. Teir vísa á hesum viðfangi á, at hetta er aðru ferð í nakrar mánaðir, at higartil ókend djór eru fingin á djúpum vatni við Japan. Eins og tað fyrra varð tað seinna djórið koyrt í eitt kar, men í gjár doyði tað.



*Tað sjáldsama djórið*

# iva í søguni




*Samkoman, sum Beta Files skipar fyri í morgin, verður í hølunum hjá P/F Beta í Saltangará, sum Faroe Seafood nú eigur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Olaf framløgu

Á samkomuni á Beta hósdagin fer Olaf Olsen at siga nøkur orð um tíðina, sum farin er.

- Tað virðismikla í øllum hesum eru skjølini, har hvørt einasta eitt er tókt heilt síðan byrjanina í 1977. Tað er ein »dylla« hjá mær at goyma gomul skjøl, og tá hesi eru vorðin gomul, fært tú ikki í lag at koyra tey burtur.

Tíbetur, kunnu vit siga.

Í dag eigur Beta Files stívliga 3000 brævornarnar við fleiwiri enn einari miljón skjølum og nakrar hundrað skipsdagbøkur.

Hetta man soleiðis vera drúgvasta skjalatilfar, ið finst um virksemið hjá einum støðugum reiðarii yvir so mong ár.

- Bóklingurin, sum vit hava gjørt, er bert ein »forsmakkur« upp á alt hetta tilfar, ið sjálvsognargrunnurin eigur.

### Granskingartilfar

Olaf Olsen heldur, at hetta tilfar saktans kundi verið nýtt í granskingarhøpi, men hann væntar ikki, at tað verður hann sjálvur, sum fer at gera tað arbeiði, sum kann spyrjast burtur úr øllum hesum.

- Nei, eg vænti ikki, at eg fari at granska hetta tilfar í tann mun, tað hevur uppiborið, men vit fara at gera tað klárt til møguliga gransking.

Hann sigur, at hann soleiðis er farin undir at skanna øll hesi skjøl, og tað fer at taka sína tíð, tí her má eitt skjal skannast fyri og annað eftir.

- Vit vita ongan snildari máta at gera hetta upp á, leggur Olaf aftrat.

### Ein miljón krónur

Sjálvognargrunnurin Beta Files, sum Olaf Olsen og Tjaldur hava stovnað í felag, verður stjórnaður av eini trímannanevnd, men Olaf er ikki sjálvur við í nevndini.

Hann avdúkar kortini, at hann hevur sett eina hálva miljón krónur í Beta Files, og Tjaldur hevur somuleiðis sett eina hálva miljón krónur í grunnin, sum nú eigur rættindini til alt skjalatilfarið.

- Seinni hevur so Faroe Seafood keypt felagið og hevur yvirtikið allan rakstur og soleiðis eisini alt komandi skjalatilfar hjá felagnum, sigur Olaf Olsen at enda.



*Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari, heldur, at skjalatilfarið, sum Beta Files nú eigur rættindini til, saktans kundi verið nýtt í granskingarhøpi, men hann væntar ikki, at tað verður hann sjálvur, sum fer at gera tað arbeiði, sum kann spyrjast burtur úr øllum hesum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Olaf óførur reiðari

**- Olaf Olsen var ein fyrimyndarligur reiðari. Eg havi ikki eitt ringt orð at bera honum øll hesi mongu ár, eg havi siglt hjá Beta. Hann var ein ótrúligur diplomatur, sum dugdi serstakliga væl at takla tingini og loysa málini, sigur Ólavur Samuelsen, skipari á Baki, sum hevur siglt hjá Beta síðan 1978**

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo




*Árið í ár hevur higartil verið tað besta hjá Baki og Stelki, síðan skipini komu í flotan. - Vit hava fiskað fyri slakar 13 miljónir krónur higartil í ár, og tað er óføra gott, sigur skiparin, Ólavur Samuelsen, sum kom aftur av túri í morgun*

*Mynd: Vilmund*

Ein av monnunum, sum hevur siglt hjá reiðarínum Beta at kalla øll árini, síðan felagið fór undir at reka fiskiveiði, er víkarmaðurin, Ólavur Samuelsen, sum býr í Elduvík.

Hann hevur verið skipari við fleiri av gomlu kubabátunum, og er eisini maðurin, ið hevur fingið heiðurslønir sum stinnasti skiparin hjá felagnum at fiska.

Síðan nýggju trolararnir, Bakur og Stelkur komu, hevur Ólavur ført Bak.

- Eg havi siglt hjá Beta heilt síðan tíðliga í 1978, tá tey fyrstu skipini komu aftur úr Noregi eftir umbygging. Í umleið eitt ár av øllum hesum, var eg við Neptun og Skansatanga, og síðan fór eg aftur at sigla fyri Beta.

### Góður reiðari

Ólavur Samuelsen sigur seg hava alt gott at bera Olafi Olsen, sum øll hesi árini var reiðari hjá felagnum.

- Jú, Olaf var ein fyrimyndarligur reiðari, og eg havi ikki eitt ringt orð at bera honum øll hesi ár. Hann var ein ótrúligur diplomatur, sum dugdi serstakliga væl at takla tingini og loysa málini allan vegin ígjøgnum. Tað skal Olaf Olsen eiga frá mær.

Ólavur vísir á, at tá tú hevur siglt so leingi hjá einum og sama felag, er tað altíð okkurt, sum hevur stungið seg upp og skal loysast.

- Olaf var ógvuliga góður at fáast við. Hann var so avbalanseraður, róligur og siðiligur. Eg trúgvi neyvan, at nakar annar hevði megnað at loyst málini betur, enn hann gjørdi hesi árini.

Skiparin heldur, at tað sigur ikki so lítið um reiðaríið, at so lítið skifti hevur verið í manningunum við kubatrolarunum hesi sløku tríari árini.

### Alternativini

Ólavur vísir á, at stundum verður høgt eftir teimum, sum reka fiskivinnuna á sjónum.

- Tað er so javnan, vit síggja og hoyra, at nú mugu aðrir sleppa fram at í vinnuni, og tað er ikki so sjáldan, at høgt verður eftir teimum, sum reka skip og bátar. Kortini vísir tað seg, at hvørja ferð, tað hevur gingið illa í vinnuni, eru tað teir somu menninir, sum »dukka« uppaftur, tá vinnan fótar sær aftur.

Hann spyr tí, hvar alternativini eru til teir, sum reka skipavinnuna í dag.

- Ikki tí; eingin hevði verið fegnari enn eg sjálvur, um tilgongd var, bæði til skiparaksturin – og til skipini, heilt av dekkinum og upp á brúnna. Skulu vit framhaldandi sigla, er umráðandi, at ungar kreftir taka yvir, tí teir, sum eru meira tilkomnir í dag, verða ikki verandi í allar ævir, sigur skiparin.

### Besta árið

Bakur og Stelkur vóru aftur í Saltangará í morgun við 440 kørum, sum viga eini 460.000 pund tilsamans.

- Tað hevur verið heldur minni at fingið í seinastuni, men hetta er ein góður túrur, har vit selja fyri einar 800.000 krónur.

Skiparin veit at siga, at árið higartil í ár hevur verið tað besta hjá Baki og Stelki, síðan skipini komu í flotan.

- Vit hava fiskað fyri slakar 13 miljónir krónur higartil í ár, og tað er óføra gott.

Hann vísir á, at í fjør kom eldur í annan bátin, meðan hann lá við bryggju í Saltgangará, og hetta gjørdi, at skipið var úr vinnu ein fittan part av tí góðu tíðini.

- Í ár hava vit mist ein túr vegna okkurt brek, og so skjótt vit missa ein túr, missa vit eisini umleið eina miljón krónur, soleiðis sum fiskiskapurin hevur verið. Tá ið alt gongur, sum tað eigur, fiska vit fyri umleið eina miljón hvønn túrin, sigur Ólavur.

### Góður eftirmaður

Vit spurdu hann eisini at enda, hvat honum dámar nýggja reiðaran hjá felagnum, sum nú eigur skipini, Jónsvein Knudsen, ið stendur fyri skiparakstrinum fyri Faroe Seafood, sum nú eigur Bak og Stelk.

- Jú, mær dámar væl Jónsvein Knudsen, og hann hevur stóran áhuga fyri skiparakstrinum. Vit kennast væl og práta nógv saman. Hann er ein góður eftirmaður, sigur Ólavur Samuelsen, skipari.